# gi í Bolivia





Ein av mongu fjallaryggunum í Bolivia

Móttøkan í Bolivia, tá ið fyrra flogfarið kom í februar. Frá vinstru: Salazar generalur, næsti maður í flogvápninum, Hans Chr. Petersen, stýrimaður, forsetin í Bolivia Evo Moralis, Hans Hansen, Trigo generalur, ovasti í flogvápninum



***Útsýnið er fantastiskt. Her síggja vit frá vinstru: Hans Hansen, Hans Christian Petersen, Mourits Joensen og canadiaran Robert Audoux, sum var tulkur***



***Hans Hansen við manning***

minst eftir, at hann á fundi í ST í New York kallaði amerikanska forsetan George W. Bush terrorist. Eitt óvanligt stig hevur hann tó tikið, sum uttan iva gevur undirtøku. Hann er farin eina helvt niður í løn! Men hvussu hann annars fer at roynast kann bert tíðin fara at vísa.

## Búði í 4-5.000 metra hædd

Tann størsti býurin í Bolivia er Santa Cruz, sum liggur í láglendinum. Hann er fíggjarliga kraftsentrið, har livistøðið er hampiliga gott. Fólkatalið her er ein knøpp millión.

Landið er stórt, og vegakervið er so sum so. Kortini er busssamband um alt landið. Har er ofta illa koyrandi í láglandinum í regntíðini. Nakað av toksambandi er eisini, eins og tað ber til at ferðast við ferðafólkabátum eftir áunum, sum tað er nógv til av.

Tískil er neyðugt við einum góðum innlendis flogsambandi. Tað hava verið fleiri privat flogfeløg. Men tað er eisini eitt alment flogfelag, sum verður rikið av herinum. Teir nýta sama slag av flogførum sum Atlantsflog, og hetta er orsøkin til, at teir hava sent boð eftir Hans at leggja teimum lag á.

Høvuðsstaðurin er La Paz við 800.000 íbúgvarum, og tað var her Hans helt til. Her á leiðini stendur ikki so væl til fíggjarliga, og ein stórur partur av býnum, sum liggur á háslættanum har flogvøllurin liggur, er slumm við stórum fátækradømi. Hetta er uppi í fjøllunum í 4-4.500 metra